## Súkkla á ólavsøku

Fríggjakvøldið skipar TSF fyri súkklukapping á Hálsi í Havn, har kappast verður í átta ymsum bólkum. Gentur og dreingir kappast í trimum ymsum aldursbólkum hvør, og hartil verður eisini kapping fyri unglingar og vaksin. Øll tey, ið ætla at vera við í súkklukappingini møtast á Heykavegi, har, ið byrjað og endað verður. Kappast verður í býarkoying. Teinurin er: Heykavegur - Staravegur - Falkavegur - Tjaldursvegur - Heykavegur.Vaksin og unglingar súkkla kl 18.30 og 50 minuttir fram + ein umgang. Barnakappingarnar byrja kl 19.30. Tað er krav, at súkklararnir nýta hjálm fyri at luttaka í kappingini. Tilmelding til kappingina er á staðnum ein tíma, áðrenn kappingin byrjar.



## Byrjar 1. august

Brian Marshall, ið skal lyfta arvin eftir Jón Bjarnasyni sum landsliðsvenjari í svimjing, tekur við nýggja starvi sínum 1. august. Talan er um samstarv millum føroyska og íslendska svimjisambandið, og fer hann altso at virka sum venjari í tveimum ymsum londum. Fyrsta uppgávan, sum Brian skal standa á odda fyri svimjihaldsliðnum, er NJM, ið verður í Føroyar fyrstu dagarnar í desember mánaði. Tvær vikur seinni verður EM á stuttbana hildið í Ungarn.

# Skert HB-lið spælir fyri æruni

**Seinasti dagurin, sum flytingarvindeygað var opið, fór illa við HB, sum eisini má vera Jákup á Borg fyriuttan**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sammett við fyrra dystin móti íslendska FH, so verður tað eitt skert HB-lið, sum klokkan 19 í kvøld fer á vøllin móti íslendska FH.

At Christian Høgni Jacobsen er farin aftur til NSÍ er sjálvandi stórur missur fyri liðið, har breiddin eisini er skerd við missinum av Pæturi Jørgensen, Svend F. Jacobsen og Bárður Mittelstein.

Hartil kemur, at Jákup á Borg ikki verður við í hópinum í kvøld. Liðskiparin hjá HB hevur alt árið drigist við ein skaða í lærinum, og nú eru boðini, at talan verður um longri steðg, soleiðis at lærið veruliga fær tíð at koma fyri seg.

Á pluss-síðuni telur sjálvandi, at Rógvi Jacobsen aftur er tøkur, eftir at hann hevur sitið sítt leikbann av sær. Og móti kropsliga sterku íslendingunum er tað sjálvandi ein góður stuðul hjá HB.

Hóast teir í fyrra dystinum taptu 4-1, og harvið eru at kalla avskrivaðir undan seinna dystinum, so er málið hjá HB avgjørt, at teir skulu hava stig burtur úr dystinum.

Vit vilja fyrst og fremst reisa okkum eftir dygga ósigurin í Íslandi. Tí somikið nógv betri enn vit vóru teir ikki. Fyri sjálvsálitið í hópinum hevur ein sigur eisini nógv at siga, eins og tað eisini hevði sæð betri út á pappírinum. So sigurin er avgjørt tað, sum vit fara eftir, sigur HB-málverjin, Tróndur Vatnhamar.

Dysturin í kvøld verður spældur á Tórsvølli, og finski Petteri Kari blæsur fyri fyrstu ferð í floytuna klokkan 19.00.



*HB-liðskiparin, Jákup á Borg, ætlar nú at fáa sær nakað av hvíld, soleiðis at argandi lærskaðin kann fáast burtur*
*Savnsmynd/álvur*

## U17 klárt til NM



*Tað gekst bara heilt væl, tá føroyska U17-liðið hitaði upp til NM-kappingina við sigri í Aberdeen Football Festival*
*Mynd: www.football.fo*

Fyrst í august mánaði skal føroyska U17-landsliðið í fótbólti dystast um NM-heitið. Kappingin í ár verður í Vejle, og ólavsøkuaftan fer føroyska ferðalagið úr Føroyum til Billund.

Upphitingin til NM-kappingina gekk fyri seg í Aberdeen, har Føroyar vunnu kappingina, so talan er um ein hóp við góðum sjálvsáliti, sum nú fer avstað.

Venjarar hjá liðnum eru Pætur Clementsen og Finn Johannesen, og hava teir tikið út hesar 18 spælararnar. Thomas J. Thomsen, Hallur Hansson, Kristin R. Mouritsen, Jógvan Rói Davidsen HB, Teitur Gestson, Sørmund Kalsø, Dánjal Pauli Lervig KÍ, Heini Vatnsdal, Hanus Mortensen, Mikal Jespersen VB/TB, Jóan Símun Edmundsson B68, Róaldur Jacobsen B36, Viljormur Davidsen, Karl Løkin, Monrad H. Jacobsen NSÍ, Bjarti Hansen, Eli F. Nielsen FSV04, Jens M. Jensen EB/ST.

Umframt teir báðar venjararnar eru Rúni Heinesen, ferðaleiðari, Andras Thomsen, liðleiðari, Fanny Kruse, fysioterapeutur og Lars Müller, sum er dómari, eisini við á ferðini.

**-mørk**

# Protest-súkkling á Tour'inum

**Tá seinasta fjallaetapan í dag varð skotin ígongd, var hetta undir kraftigum mótmælum frá teimum fronsku og týsku liðunum, sum eru við í Tour de France**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tey seks fronsku og tey bæði týsku liðini mótmæla, at tað eru fleiri lið, sum hava súkklarar á liðnum, hóast hesir eru undir illgruna fyri nýtslu av stimbrandi evnum. Tað verður ikki sagt beinleiðis, men eingin ivi er um, at ónøgdin serliga er vend móti Rabobank og danska Michael Rasmussen. Maðurin í gulu troyggjuni er ikki testaður positivur fyri doping-nýtslu, men luttakandi liðini á Tour'inum gjørdu fyri tveimum árum síðani avtalu um, at einki lið skuldi hava súkklarar á liðnum, sum vóru undir illgruna fyri dopingnýtslu.

Tað ljóðar eisini, at somu átta liðini fyri fleiri døgum síðani høvdu fund. Har var felags niðurstøðan, at Rabobank átti at tikið Michael Rasmussen av liðnum, tá hesin ikki hevur givið røttu fráboðanirnar til altjóða doping-eftirlitið.

Sjálvur tykist Rasmussen tó ikki at leggja nakað í hetta. Hann súkklar framvegis í gulum, og kemur hann heilskalaður úr dagsins etapu, er ilt at síggja, at nakar annar súkklari í feltinum skal hótta samlaðu oddastøðu hansara. Næstur Rasmussen er spanski Alberto Contador, sum súkklar fyri Discovery Channel. Eisini hann er seinastu tíðina skuldsettur fyri nýtslu av doping, men heldur ikki hann er tó testaður positivur.



*Bæði Michael Rasmussen, sum her sæst í gulum, og Alberto Contador, sum sæst í hvítum, eru undir illgruna fyri doping-misnýtslu. Og tað fær nú fleiri av hinum liðunum í Tour de France at mótmæla*
*Mynd: Polfoto/AP*